# Bill skal venja B68

Næsta ár fer B68 at spæla í Formuladeildini, og nú er greitt, at tað verður Bill Jacobsen, sum verður venjari. Á b68.fo verður sagt, at felagið og Bill Jacobsen hava skrivað tvey ára samstarvssáttmála. Bill er venjari hjá U21 landsliðnum. Hann hevur eisini havt ábyrgdina fyri ungdómsvenjingini á Toftum. - Vit kenna hansara dygdir sum venjari, og vit vænta okkum nógv av honum tvey tey næstu árini, sigur B68 formaðurin, Jógvan Højgaard. Enn hevur einki verið at hoyra um spælara tilgongd, men sambært b68.fo verður arbeitt við at styrkja um hópin. Málið er at fáa eitt spennandi lið, sum kann standa seg í Formuladeildini.



## Vit fara eftir silvur

EB/Streymur fekk trý týdningarmikil stig á heimvølli sunnudagin, tá teir tóku ímóti B36. Ein av mest eyðsýndu spælarunum henda dagin var Hanus Eliasen, sum skeyt tvey av málunum í 4-2 sigrinum. Hann var sum vera man væl nøgdur við sigurin á B36.

- Ja, vit eru øgiliga væl nøgdir við sigurin. Eg haldi, at vit vóru væl betri enn teir henda dagin, og so vóru vit ikki minst nógv farligari, tá vit høvdu bóltin, so sigurin var fult uppiborin, sigur Hanus.

Sjálvt um hann metti sigurin vera fult uppibornan, so var hann tó ikki nøgdur við, at heimaliðið lovaði B36 inn aftur í dystin.

- Vit spæla sera væl fyrstu løtuna og koma eisini á odda 2-0, men so lova vit teimum inn aftur í dystin, og hetta er ikki gott nokk. Teir fáa tvey alt ov løtt mál eftir deyðbóltar, og eftir at teir høvdu javnað standa vit ikki serliga væl á vøllinum, og hetta ger eisini, at teir hava nógv spæl síðstu løtuna fyri steðgin. Eftir steðgin reisa vit okkum tó og vísa, at vit høvdu uppiborið sigurin, staðfestir Hanus.

At enda spurdu vit hann, um teir nú fóru eftir silvurinum.

- Ja, sjálvandi fara vit tað. Fyrst og fremst mugu vit sjálvandi vinna okkara dyst á Sandi komandi leygardag, og so mugu vit eisini fáa hjálpa frá HB í Gundadali, men vónirnar eru har, sigur Hanus.

EB/Streymur-B36 4-2 (2-2):

# EB/Streymur endaði við fýrverki

**Sjálvt um dysturin í Streymnesi til tíðir var rættiliga javnur, so var EB/Streymur tó nógv vandameiri framman fyri málið. Tí var tað eisini fult uppiborið, at EB/ Streymur vann 4-2 á B36 í einum sera væl leiktum dysti**

**FÓTBÓLTUR**
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

*EB/Stremur*

*B36*



*EB/Streymur og B36 góvu áskoðarunum undirhald fyri allan peningin í Streymnesi sunnudagin, men tað var tó EB/Streymur, sum vann ein uppibornan 4-2 sigur.*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

Lagt var upp til ein spennandi toppdyst í formuladeildini sunnudagin, tá EB/ Streymur á triðja plássi tók ímóti B36 á øðrum plássi. Undan dystinum var B36 fýra stig framman fyri, og tí kundu teir endaliga tryggja sær silvurkrúnurnar við einum sigri ella einum javnleiki í Streymnesi.

Undan dystinum var eisini greitt, at liðið hjá B36 var illa skert til henda dystin. Teir báðir sterku miðvallarleikararnir, Mikkjal Thomassen og Klæmint Matras, vóru nevniliga ikki við vegna skaða, meðan Alex J. Dos Santos var úti við leikbanni, og hetta megnaðu sundalagsmenn at gera sær dælt av. Tað var nevnililga samansetta liðið, sum vann eftir helst besta dyst, sum er spældur við nýggja vøllin í Streymnesi hetta kappingarárið.

### Undirhald fyri allan peningin

Heimaáskoðarararnir í Streymnesi hava ikki fingið líka nógv undirhald fyri peningin í ár, sum tey fingu í fjør. Í fjør var spælið til tíðir sera gott hjá samansetta liðnum í Sundalagnum, men í ár hevur verið langt ímillum vøkrukombinatiónirnar og flottu málini. Síðstu dystirnar hevur spælið tó til tíðir verið sera gott, og sunnudagin var aftur ein av góðu døgunum hjá EB/ Streymi.

Teir byrjaðu nevniliga sum eitt rættiliga ódnarveður í dystinum móti B36, og dysturin var bert tríggjar minuttir gamal, tá Hanus Eliasen akkurát fekk høvdið á ein innlegg frá Sorin Anghel, og via stongina fór bólturin í málið til 1-0. Ein dreymabyrjan hjá heimaliðnum.

Men Sundalagsmenn vóru ikki lidnir enn. Dysturin var bert 15 minuttir gamal, so lá bólturin aftur í málinum hjá B36. Hesa longdi Sorin Anghel eitt innkast við høvdinum, og so kundi Hanus Eliasen skjóta sítt næsta mál í dystinum. Uppiborið 2-0 til EB/ Streym.

Sjálvt um tað var EB/ Streymur, sum sat á tí mesta hesa løtuna, so var tað tó B36, sum minkaði um munin, tá fyrri hálvleikur var hálvrunnin. Jóhan Gunnarson sendi eitt hornaspark inn fyri málið úr høgru, og sjálvt um René Tórgarð fekk fingrarnar á bóltin, so ferðaðist hann beinleiðis í málið.

Málið til 2-1 fekk rættiliga gongd á B36, og nú royndu teir at trýsta EB/ Streym, og tá fimm minuttir restaðu fyri steðgin, gav trýstið úrslit. Enn eitt fríspark bleiv sent inn í brotsteigin, og har fekk ein B36-leikari høvdið á. René stórbjargaði royndini, men returbólturin endaði hjá Sylla, sum lættliga kundi skalla bóltin í mál til 2-2, sum eisini gjørdist hálvleiksstøðan.

### Fantastisk mál avgjørdi dystin

Undirhaldið fyri steðgin hevði verið sera gott í Streymnesi sunnudagin, og tí kom tað ikki óvart á nakran, at liðini tóktust heldur meir varin eftir steðgin. Vindurin var eisini blivin heldur sterkari nú, og tí var ikki lætt at spæla fótbólt.

Bæði EB/Streymur og B36 royndu tó av øllum alvi at spæla bóltin ímillum sín, og bæði Sylla og Arnbjørn høvdu góðar royndir fyrsta partin av seinna hálvleiki. Fyrsti veruliga kjansurin kom tó ikki fyrrenn seinni hálvleikur var meir enn hálvrunnin. Hanus Eliasen breyt væl ígjøgnum í høgru og fann ein púra leysan Arnbjørn Hansen, sum úr fimm metrum knallaði bóltin langt upp um málið.

Men Arnbjørn skuldi fáa sítt mál í hesum dystinum, og tað kom, tá 15 minuttir vóru eftir at spæla. Hans Pauli rak upp ígjøgnum vinstru síðu, men fann ongan at spæla til. Tí rak hann nakað aftur í vøllin, áðrenn hann við eini heilt fantastiskari avlevering fann Arnbjørn, sum hevði runnið seg í góða støðu. Hesin smekkaði til fyrstu ferð, og so var 3-2.

Síðstu løtuna royndi B36 at trýsta fyri at fáa útjavnandi málið, men tað skuldi tó vera heimaliðið, sum fekk síðsta orðið í hesum dystinum. Í yvirtíðini fór EB/Streymur í eitt skjótt mótálop, eftir at Rafael Kwieczinski vann bóltin. Hann spældi bóltin til Hans Paula, sum fann ein púra leysan Karoly Potemkin. Hesin sendi bóltin framvið Jákupi, og so vann EB/ Streymur dystin 4-2.

Við sigrinum hava sundalagsmenn tryggja sær triðja plássið, eftir at HB bert fekk javnleik ímóti KÍ, og nú kunnu teir eisini røkka einum silvurheiðursmerki, um teir vinna á B71 í síðsta umfari, samstundis sum B36 ikki fær fult ímóti HB í Havn.